Orðaskifti:

Menighedsråds virke

I et interview i Sosialurin de. 10/4-1999 siger Atli Hansen bl.a. at »teologisk kjak eigur ikki at fara fram í kirkjuráðunum«. Dersom dette var korrekt, så var der en del af det arbejde, menighedsråd i dag gør, som ikke kunne finde sted i menighedsrådets regi. Det er korrekt, at menighedsråd ikke er ældsteråd, men det er ikke det samme som at teologiske drøftelser ikke skal finde sted. Lad mig blot nævne to eksempler.

1) I dag er det - desværre - sådan, at præster kan foretage en kirkelig markering (dvs. afholde en »fest«gudstjeneste, når f.eks. to mænd har indgået registreret partnerskab. Denne kirkelige markering kan alle præster foretage - også os på Færøerne. På Færøerne skal præsterne dog jvf. brev fra Kirkeministeriet af 2/12-1997 indhente menighedsrådets tilladelse til afholdelse af en sådan gudstjeneste. Spørgsm ålet er nu: Hvem er det, der volder splittelse? Dem, der holder fast ved Guds Ord og siger nej, eller dem, der forkaster Guds Ord og siger ja? Eller skal vi blot for »fredens« skyld akceptere, at det nu er blevet tilladt i folkekirken? Den teologiske drøftelse kommer menighedsrådet ikke uden om, den dag det eventuelt bliver aktuelt, for det er lagt hen til menighedsrådene på Færøerne at afgøre, om en sådan gudstjeneste kan finde sted.

2) Det er ikke længere siden end i 1994, at biskoppen i brev af 17/10 netop bad menighedsrådene drøfte teologi, blandt andet den lutherske 'embedsforståelse' i forbindelse med 'Porvoo-erklæringen' og komme med en (teologisk) udtalelse om vor holdning til denne erklæring.

I den aktuelle situation er det bl.a. 'embedsforståelsen' der står på spil, da der for tiden indføres en helt ny kirke-, kalds- og embedsforståelse i den færøske kirke. Tillad mig at citere fra det sidste nummer af Præsteforeningens Blad (31. mars 1999), hvor dr. theol. Anders Nørgaard bl.a. skriver om præsters embedsvirke og kirkeforståelsen: »Som præst er man netop ikke forpligtet over for »menneskeheden«, ja end ikke over for »folkekirken«, men netop over for den konkrete menighed. Det er jo menighedens kaldelse, som efter traditionel luthersk opfattelse - endnu - danner baggrund for, at man overhovedet er præst og kan blive ordineret til tjeneste i folkekirken. »Koncern-tanken« vinder for tiden frem inden for folkekirken, den er måske ønsketænkning hos biskopper, der gerne vil være koncernchefer og fagforeningsledere, der tænker i samme baner. Og det er da muligt, at der skal ske ændringer i den retning, men i så fald skal de ske efter grundig overvejelse og som en ansvarlig beslutning. En sådan radikal ændring af kirken skal ikke smugles ind ad bagvejen… Og endnu er det sådan - og måtte det vare ved - at man jo er præst for en konkret menighed dog ikki en »Folkekirkekoncern«.

Er man kaldet af en lokal menighed og præst for en lokal menighed og har ansvaret for denne menighed, eller er vi i en koncern, hvor menighedens kald og præstens embede i og ansvar for netop den kaldende menighed, reelt kun er pæne ord uden samsvarende indhold? Blandt andet om dette gælder det. Hvis ikke menighedsråd kan drøfte dette, hvordan kan de så deltage i de drøftelser som den færøske menighedsrådsforening lægger op til for tiden om den fremtidige færøske kirke?

Peter O. K. Olofson
Sognepræst,
Fuglefjord præstegæld

Finn eymleikan fram, Olofson…

Tað er við sorg í sinni, at eg fylgi við tí stríði, ið hevur tikið seg upp millum Peter O. K. Olofson fuglafjarðar prest, nakrar fáar aðrar prestar og mótstøðumaður teirra er, Føroya Bispur, tí eg meti, at nú er tað komið so langt út, at vandi er fyri, at klovningur kemur í ta føroysku fólkakirkjuna og tað verður brak við lít og tað er stórt spell, at soleiðis skal ganga.

Tit allir ið stríðast móti bispi og kvinnuligum prestum, tit hava uttan iva gloymt at prædika evangelium við sínum stóra kærleika og fyrigeving, nei, tit liva tykkum inn í gamlar skrivaðar reglur um hvussu alt gekk fyri seg í agggomlum døgum, fordøming av hesum og hasum, kvinnur skuldi haldast burtur frá allari vitan og vísdómi og kundu ikki sleppa at tala alment, ei heldur um sín Harra og Frelsara.

Í dag er ein onnur tíð, Guð havi lov. Kvinnur lesa til prest og fáa embæti á líka fót við menn her hjá okkum, men tað eru kreftir, ið royna at forða fyri hesum og ein av hesum er Peter O. K. Olofson prestur. Hann sigst at vera mest bíbliukønni prestur í Føroyum, men eg haldi at tað nyttar lítið, tá hann bert fonglast við fordómar og forboð, eftir skriftini og gloymir evangeliið við bæði kærleika og fyrigeving.

Marjun Bæk og hennara lestur í lestrabókini, ið Peter O. K. Olofson fordømir, hevur hann sjálvandi loyvi at halda hvat hann vil um, men hann kann ikki tvinga onnur, at fordøma alla lestrabókina.

Marjun Bæk og hennara medsystrar hava lært til prest og staðið sína eksamiu og hava fingið síni kall og tey hevur so nú einaferð føroya bispur sett inn og tað er stór skomm, at nú Fuglafjarðar prestur og nakrir fáir aðrar prestar, sleppa at knúsa kirkjuna upp á so stívrendar meiningar, nei betur er bøtandi hond enn spillandi tunga. Marjun og hennara medsystrar hava valt tann góða lutin og hann mást tú ikki taka frá teimum harra Olofson. Tú sigur: At um ikki bispur gevur tær hond og hálsrætt í tíni søkn, so sigur tú teg úr starvi. Góði Petur O. K. Olofson, eg vóni tú finnur eymleikan og fyrigevingina fram, so skal tær nokk gangast væl, ella er eitt at gera, og tað er stinga í sekkin, áðrenn kirkjan í tíni sókn syndrast og tað vilt tú neyvan, ella hvat?

Vinarlig heilsan
Eyðálvur K. Nielsen
Rituvík

Javnaðarflokkurin hevur fíggjað sína egnu munnkurv

Sosialurin sá dagsins ljós fyri umleið trý fjórðings øld síðani. Stovnarnir foru undir blaðið við egnum peningi og møguliga við hjálp frá danska Javnaðarflokkinum fyri at koma til orðanna í samfelagnum. Teir bygdu blaðið upp eftir fíggjarligum førimuni og vóru góðir við sítt blað. Einki at ivast í, at tað fór nógv ólønt persónlig arbeiðsmegi í hetta blað.

Blað javnaðarmanna var upp í gjøgnum 60'ini og 70'ini og ikki minst 80'ini ímyndin av samfelagnum, tí blaðið var allastaðni, kom allastaðni, og øll samfelagskjakini vóru sprottin úr onkrari grein, sum hevði staðið í blaðnum.

Mitt í 70'unum tóku javnaðarfeløgini lógvatak at taka upp lán hvør í sínum lagi, so Sosialurin kundi halda fram. Hetta eydnaðist, ja, okkurt av feløgunum er nústani liðugt at gjalda sín part av láninum. Upp í gjøgnum 80'ini vóru bald: utar tíðir, og blaðið signaleraði ofta, at fíggjarliga stóð ikki so væl til, og nú mátti okkurt gerast. Full segl vóru sett at fáa leysasøluna í fasta legu.

Í 90'unum vórðu ognarviðurskiftini á Sosialinum umskipað. Fyri Javnaðarfólk *var* blaðið okkara blað, men umskipanin hevur havt við sær, at so er ikki longur. Í sambandi við umskipanina varð partapeningurin, sum limafeløgini høvdu lagt rygg til, niðurskrivaður til null, samstundis setti Føroya Javnaðarflokkur stóran partapening í feløgini (uml 500.000 kr.). Men nú skuldi blaðið stýrast eftir handilsligum prinsippum, - ikki politiskum!

Í grundini er Sosialurin í dag ein undarligur bastardur. Føroya Javnaðarflokkur er einasti eigari, men hevur sett partapening í eitt politiskt óheft tíðindablað, sum verður rikið eftir handilsligum prinsippum. Merkiligt at hugsa sær: Føroya Javnaðarflokkur fíggjar sína egnu munnkurv við hálvari millión krónum…! Ella sæð frá leiðslusíðu: Blaðleiðslan gevur út eitt blað, sum gevur seg út fyri at vera eitt politiskt óheft tíðindablað, rikið eftir handilsligum og almennum journalistiskum prinsippum, men er fult og heilt fíggjað av einum politiskum flokki!

Sjálvandi kann blaðleiðslan siga, at tað stendur javnaðarfólki frítt at skriva í blaðið, men hetta staðfestir bert, at blaðið er eins nógv t.d. eitt tjóðveldisblað sum eitt javnaðarblað, men fíggjað av Føroya Javnaðarflokki! (uppundir løgtingsvalið vóru tað javnaðarsíður, tjóðveldissíður,-sjálvstýrissíður o. s. fr. í blaðnum, ikki tí blaðið kendi eina politiska upplýsingarskyldu, men út frá handilsligum prinsippum, eftirsum flokkarnir guldu fyri plássið).

Tey gomlu javnaðarfólkini løgdu pening og orku í teirra hugsjónarblað, og limafeløgini tóku í 70'unum lán fyri at fíggja sín hugsjónarboðbera; tað politiska kom í fremstu rað og síðani tað handilsliga. Teir góðu, gomlu vinnulívsmenninir settu egnan pening í sína fyritøku og settu ognir í veð fyri at reka vinnuvirksemi eftir handilsligum prinsippum.


Sosialurin í dag er hvørki fuglur ella fiskur: Umskipanin í 90'unum byggir á mest óhepna prinsippið frá 80'unum: Ein leiðsla rekur eitt óheft tíðindablað eftir handilsligum prinsippum fyri pengarnar hjá øðrum, nevniliga einum flokki, ið hevur eina hugsjón og ikki handilsligan vinning sum endamál.

Vestmanna 7. apríl. 1999

Birgir Waag Hognesen
næstformaður í
Norðstreymoyar
Javnaðarfelag

UPPVASKIMASKINUR • UPPVASKIMASKINUR


Lítla, raska uppvaskimaskinan
...ið nøktar allan vanligan tørv í húsarhaldinum



Uppvaskimaskina
Sindra /Morris

TILBOÐ
Vanl. prísur 3.325,-
2.990,-

TILBOÐ



PLS - 602
Uppvaskimaskina
Vanl. prísur 4.325,-
3.890,-

Vit hava smáar uppvaskimaskinur, prísir frá 2.990,-

ELDING
SMS • Tlf. 318662 - 318663• Saltangará tlf. 447662